# Tær hava yvirtiki› kassan

*Systrarnar Arnleyg og Ey›britt Krosslá hava yvirtiki› Brey›kassan, i› byrja›i sum partur av virkseminum hjá einum n‡stovna›um bakarii. Solei›is hava tær sjálvar funni› sær arbei›spláss og kunnu samantvinna arbei›i og barnaansing*

Dagfinn Olsen




*Systrarnar Ey›britt og Arnleyg hava nú yvirtiki› Brey›kassan í Vági og ætla at økja vøruúrvali›. Á Jóansøku selja tær m.a. kaffi, the, pizza og smurt brey ›*

Mynd: Dagfinn Olsen

Í fjør byrja›i n‡ggjur bakari virksemi í Porkeri. Í Vági lat hann upp søludeildina, i› nevninst Brey›kassin. Nú hava systrarnar Ey›britt og Arnleyg yvirtiki› kassan. Hetta hendi tann 5. juni í ár.

Spyr ein tær bá›ar, hví tær eru farnar undir hetta, svara bá›ar sum vi› ein munn: hví ikki?

Tær vísa á, at arbei›spláss hanga ikki á trøunum og ein má royna at skapa sær arbei›spláss, um ein kann. Tí tóku tær av, tá tær fingu møguleikan og tær hava gó›ar vónir fyri framtí›ina.

Vi› hesum hava tær eisini møguleika at samantvinna starv og baranaansing. Tær skiftast at arbei›a og at ansa børnunum.

### Pizza á jóansøku

Í sølubú›ini Brey›kassin er eisini lítil café og hetta ætla systrarnar framvegis at hava. Umframt baksturvørur, ætla tær at hava størri úrval av vanligum vørum. Longu nú hava n‡ggju eigararnir sett síni spor. Ísmaskina er komin innanfyri diskin og dagblø› og sigarettir eru at fáa. Eisini er ætlanin at Brey›kassin skal hava longri opi›, enn hann hevur í dag.

Á jóansøku er ætlanin at selja kaffi, the, pizza og smurt brey›, umframt køkur og vanligar vørur.

Óiva› gott at vita hjá jóansøkugestum, i› kenna svongd ella bert ætla sær okkurt søtt undir tonnina.

# Ætlanir um frítí›arskúla

*Í Vági hava fólk tiki› stig til at savna inn undirskriftir, so heitast kann á kommunalu myndugleikarnar um at seta á stovn frítí›arskúla*

Dagfinn Olsen

Mynd: Dagfinn Olsen




Seinastu vikurnar hava se›lar ligi› frammi á almennum stø›um í Vági. Ein áhugabólkur, i› telur foreldur og pedagogar, heitur á fólk um at skriva undir eina áheitan um at seta á stovn frítí›arskúla.

Jógvan Krosslá, b‡rá›sforma›ur í Vági, hevur ikki sæ› hesa innsavnan av undirskriftum, men hann sigur, at slíkar ætlanir hava veri› frammi í b‡rá›num.

Fyri nógvum árum sí›ani vóru ætlanir um barnagar›, og tekningar vór›u eisini gjørdar, men høg krøv eru til slíkar barnagar›ar og ætlanin var d‡r og tí›irnar gjørdust ikki gó›ar.

Men kommunan hevur kanna› a›rar møguleikar og hevur m.a. fingi› gó› hugskot úr Havn, har myndugleikarnir hava funni› fram til ód‡rar loysnir. Jógvan Krosslá fegnast annars um fíggjarligu gongdina hjá kommununi, sum brátt kemur ni›ur á tvær álíkningar í skuld.

Men ætlanirnar um frítí›arskúla hava veri› frammi og Jógavn Krosslá sigur, at teir hava kanna›, hvussu a›rar kommunur hava loyst slík mál. T.d. eru ítøkiligar ætlanir um frítí›arskúla á Tvøroyri komandi ár.

Enn er tó einki ítøkiligt á bor›inum um frítí›arskúla í Vági, men máli› um ein slíkan hevur veri› frammi á b‡rá›sfundum, sigur Jógvan Krosslá.

Fyrireikararnir av innsavnanini av undirskriftum til frama fyri frítí›arskúla siga, at eini 87 fólk hava skriva› undir áheitanina á kommunalu myndugleikarnar í Vági. Undirskriftirnar ver›a handa›ar Jógvani Krosslá, b‡rá›sformanni, í komandi viku.

# Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt

*Jóansøkan 2000 í Vági er merkt av, at útilagstir vágbingar vitja aftur á kendar gøtur og hitta skúlafelagar, hvørt teir so eisini eru í útlegd ella framvegis búgva í heimbygdini*

Í ár hittast heili 7 skúlafokkar í Vági. Og talan er ikki um børn í skúlaaldri, men um fólk, sum fyri brátt mongum árum sí›ani tra›ka›u sínar barnaskógvar í túnnum og á skúlagólvum í Vági.

T‡skvøldi› hittust tveir av hesum flokkum til gudstænastu í kirkjuni í Vági. 50 ár eru eisini sí›ani, at nøkur teirra fermdust.

Hóast ikki allir flokkar hava ta› felags, at so long tí› er sí›ani, at tey sótu á skúlabonki, so er ivaleyst hugnaligt at hittast aftur. Óiva› hevur ári› 2000 eisini tann eginleika, at fólk fara at hugsa og seta í skipan, hvussu lív og ár eru runnin og svunnin. Nostalgi fær rúm eina løtu. Ikki sum ódámligt or›, men sum naka› sera vi›komandi og fløvandi.

Vágur er í ár 2000 vertur fyri jóansøkuni. Men eisini vertur fyri jóansøkugestum úr øllum landinum. Og ikki minst er bygdin vertur fyri sínum egnu. Vágbingum úti og heima.

Og um jóansøkuna eru júst hesir, sum eru útisetar, ikki so fáir. Dømi eru um, at fólk eru komin heilt úr Amerika til Vágs at luttaka, tá flokkar hava hitst aftur. Hóast útiseti, so dregur heimsta›urin. Í ár vitjar t.d. ein kvinna aftur í Vági, i› sum 17 ára gomul giftist til Onglands og hevur hon bú› har sí›ani 1946, men tó vitja› aftur í heimsta›num 36 fer›ir.

So tungur ein skúlatímmi kann kennast til tí›ir, líka so hugnalig er skúlatí›in at minnast aftur á. Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt og gamalt vinalag, kvø›ur skaldi› so beinraki›.

Mynd: Dagfinn Olsen



*Undir gu›stænastu í Vágs kirkju t‡skvøldi›, hittust tveir flokkar frá 1942-43. Ta› eru eisini 50 ár sí›ani, at nøkur teirra konfirmera›ust. Hetta er 3. fer› tey hittast aftur í Vági. Í kvøld, fríggjakvøld, halda tey veitslu. 7 gamlir skúlaflokkar hittast aftur í Vági um jóansøkuna*




SUÐUROYAR HEIMAVIRKI
hevur fjølbroytt úrval av
FØROYSKUM PLØGGUM
(eisini til búnan)
FØROYSKUM GÁVULUTUM
BÓKUM OG SKRIVIAMBOÐUM
TASKUM
m.a. góðar skúlataskur
Opið:
Mánad.-fríggjad. kl. 09.00-17.30
Leygard. kl. 09.00-13.00
SUÐUROYAR HEIMAVIRKI
Postboks 77 • FO-900 Vágur • Tel. 373960
Sosialurin - 311820

VIT HAVA ALT INNAN ELEKTRONIK
YAMAHA STEREOANLEGG
komplett fyrr 6.450,
JÓANSØKU-TILBOÐ
4.950,-
GOLDSTAR VIDEOMASKINA
fyrr 2.695,-
JÓANSØKU-TILBOÐ
1.999,-
Elektronikbúðin ynskir øllum eina góða Jóansøku
ELEKTRONIK-BÚÐIN
v/ Paula Poulsen





FO-900 Vágur • Tel. 37 35 29 • Fax 37 39 64 • Fartel. 31 35 29
Sosialurin - 311820

JÓANSØKU-TILBOÐ
÷20%
verður latið av øllum klæðum
NÓGV GÓÐ TILBOÐ
NÓGV NÝTT HEIMKOMIÐ
Hjá LIS Sp/f
Vágur • Tel. 374333
Upplatingartíðir:
Fríggjadag 23/6 kl. 10.00-12.00 og 13.00-19.00
Leygardag 24/6 kl. 10.00-14.00

STØÐUGT FLEIRI HALDA Sosialin
WWW.SOSIALURIN.FO
Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64
Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna. Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin ókeypis!
Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:
☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.